# Hans Jákup í Stovuni 100 ár

## (17/8 1901 - 17/8 2001)



### 3. og seinasti partur

**eftir Virgar Tórarson Dalsgaard**

### Kyrrindi og knappligt viðrák

Seinast í 50unum er útvarpið komið, og illa ber til at koma uttan um Heðin Brú, bæði sum skald og yrkamann. Feðgar á ferð verður varpað um alt landið. Tað verða kulturell og litterer kyrrindi. Politiskt koma javnaðarmenn á odda og P. M. Dam, vinmaður Hans Jákups verður løgmaður. Skaldið Heðin Brú er nú ein institutión! Teir skullu nú báðir gerast *salonfähig* eisini hjá fyrrverandi herviligum andstøðingum.

Hvussu kvalir borgaraskapið ein fyrrverandi fígginda? Jú, tað er einfalt: - *Í sukursleiskari vælvild,* smikrandi fagnaði og skammrósan.. So frá nú av — hetta er umleið fyrst í 60unum, verður hann so fagnaður og umfevndur, *at hann fær næstan ikki arbeitt.* Hann skal fevnast í hel, so allar tær farligu og hvøssu bøkurnar ongantíð koma. Hann verður settur ritstjóri á Varðanum, og menn fjøtra hann við alskyns tíðarkrevjandi umsetingararbeiði, men egið skriviarbeiði má hann forsøma og næstan lata liggja. Hans Jákup var góðlyntur maður og gjørdi nógv fyri friðs skyld. Heilsan var heldur ikki av tí allarbesta um hetta mundið.

Og so fær onkur lúnskur íspegil borið tað so í bandi, at skal hann endiliga skriva skaldsøgur, so skal tað vera um eina *heilt farna* tíð, fyri 100 ella betri 200 árum síðani. Harafturat er Bókagarður eftir honum í heilum. Okkara størsta skald verður so díkt undir í arbeiði, at tað tagnar. Hetta var misbrúk av stórum gávum. Men tað var umráðandi hjá teimum nationalu at taka tøkutenninar úr javnaðarmanninum og samfelagskritikaranum.

### Fjøtraður av Fjodori

T. d. verður Hans Jákup yvirtalaður til at fara undir risasetningin at týða Dostojevskij úr *íslendskum*. Hetta var littererur umvegur burturav, og ómenniskjansliga tíðarkrevjandi arbeiði. Men vit síggja fyri okkum, hvussu *nógvir* ugga seg og gníggja sær í hendurnar við at binda Heðin til hetta arbeiði, sum *fleiri* onnur høvdu kunnað *avrikað*. Men so skrivar hann einki um *chauvinistarnar* og teirra líkar so leingi! Serliga tápuligt spill av stilistiskum evnum var hetta, tí ikki færri enn tríggir málkønir russiskt-lesandi føroyingar stutt eftir eru um at vera lidnir sum magistarar. Tað hevði verið tað rætta: *At latið hesar* umsett Fjodor úr upprunamálinum og *givið Hedini stundir til at skapt føroyskar dýrgripir!*

Kortini eydnast tað Heðini Brú við risataki at fáa út *Leikum fagurt* í 1963. Hetta er bók, sum er eitt kompromis millum tað fyribils burturgoymdu *Morgunmenn* og so tað miðvísa trýstið frá filistarunum um ikki at røra við samtíðina.. Bókin, veit eg, var ætlað nógv hvassari. Hesum hevur hann ofta greitt pápa mínum frá. Men tað vóru nógvir talentleysir kokkar, sum hildu seg vera førar fyri at røra í pottinum hjá Hansi Jákupi og *alsamt* fíltust á. Hann mátti ikki vera for bondskur, hann mátti ikki vera so ironiskur og skeptiskur, og framum alt mátti hann vera hampuligur við teir nationalu Hesum hevur hann eisini sagt nógvum frá.. Eru hesir kokkar nevndir, so eru teir vælkendir. Hans Jákup gramdi seg viðhvørt fyri vinmonnum um, at hann føldi seg lofnaðan og skerdan. Hann slapp ikki á flog. Dilletantar royndu at gelda hansara bøkur.

Men tað er áhugavert at síggja, at sjálvt um *Leikum fagurt* bæði er ógvuliga stuttlig og beinrakin satira, so verður hon





*Seinastu árini gjørdi Hans Jákup heim sítt til eitt eldrasambýli, har hann livdi saman við javnaldrum. Hans Jákup er nr. 2 frá vinstru*

*Mynd: Kalmar*

sáplað niður (smb. ummæli hjá Hansi Thomsen), sum ikki so góð, sum tær, sum eru um bóndasamfelagið. Við øðrum orðum *býarmentanini* skal hann halda seg frá. Hann skal helst halda seg til roykstovur og torvatrøll. Hvat billar hesin tjóðveldisfilosoffur sær inn? Vit hava onga samfelagskritiska satiru, ið er í nær ella námindu av *Leikum fagurt,* - her er bæði *bit og vit,* sjálvt um hon er nógv tamd og vatnað út av forkritikarum, sum vágaðu sær at blanda seg uppí hansara arbeiði.

### Barbarar í kommunuskúlagarðinum

Heðin Brú var fordragiligur og lagaligur maður, men hann var ikki naivur, so hann lat seg als ikki forføra av loysingarmonnum. Hann visti væl, hvat búði undir kulturellu kúvendingini og tí knappligu vælvildini. Hin vegin var hann eldur og ikki nakar stríðsmadur longri, so hann lat sær lynda viðhvørt.

Men ta ferðina, táið hálvørir tjóðveldisgarpar í 1959 brutalt skræddu vinmann hansara, javnaðarmannin Poul Petersen, lærarafelagsformann niður av røðarapalli í kommunuskúlagarðinum í Havn bara tí, at hann vildi brúka sín demokratiska rætt at argumentera ímóti tjóðveldisørskapinum, gjørdist Hans Jákup ordiliga skelkaður. Eg minnist, at hann ringdi til pápa mín, og teir tosaðu leingi um, hvussu óhugnaligt tað var, at nú endurtók øll søgan seg frá fullveldistíðini beint eftir kríggið.

Hesir røsku tjóðveldisstuðlar máttu vera fýra um at fáa bast tí prúða ítróttarmanninum Pouli Petersen, so hann fekst at tiga. Teir untu ikki mótstøðumonnum talufrið. Teir toldu ikki argument. Um somu tíð sóust teir allarovastu í tjóðveldisflokkinum luska lúnskir um húsahornini eitt sindur burturfrá, har teir stóðu og eggjaðu til mótmæli móti Nato og yvirgang móti Petur Mohr Dam, sum teir ræddust.

Orsøkin var tann, at javnaðarhøvdingurin, sum tordi at siga og segði, at hann var Nato-maður um ein háls, var komin heim úr Danmark eftir samráðingar um 190 milliónа ætlanina, sum skuldi gera Føroyar til eitt vælferðarsamfelag. T.d. skuldu tey gomlu nú hava fólkapensión og eina menniskjaverduga tilveru. Hetta toldu teir nationalu ikki! — Teir vildu ikki eitt modernað samfelag fyri vanliga mannin. Fólkið skuldi framvegis trívast vid torvatrøllum og arbeiðsloysi.

### Røðan mikla

Hesin tilburður tók Hans Jákupi so fast, at hann stutt eftir helt sína lívsrøðu í javnaðarfelagnum í Havn. Henda røða vardi næstan trý korter og var beinleiðis rættað til P. M. Dam, løgmann og Villa Sørensen, blaðstjóra.

Hann fagnaði hesum monnum fyri teirra dagliga strev, ágrýtni og áhaldni fyri javnaðarrørsluni. Hetta var ein persónlig røða, sum var sjáldsama kensluborin. Hans Jákup var vanliga ikki sentimentalur, men hetta kvøldið appelleraði hann inniliga til fundarfólkið um at sýna takksemi, virðing og trúfesti fyri, at vit høvdu menn sum **P. M. Dam** og **Villa Sørensen**. Menninir, sum stóðu fremst í andglettinum og kýttust við alt tað dagliga gerandisstrevið fyri rørsluna.

Hann helt fyri við Petur Mohr: *" Hvørja ferð vit vóru við at missa mótið, so var tað tú, sum fekk okkum aftur á føtur. Tú trúði uppá, at vit altíd fyrr ella seinni vildu sigra, tí vit høvdu tey rættvísu og skilagódu argumentini, meðan hinir bara høvdu øsing og følilsir — vit skuldu brúka demokratiska rættin og lata hinar um at brúka nevarættin. Nevarætturin vildi altíd lúta, sum fráleið!"* Javnaðarrørslan var so lívsneyðug, at hon mátti ikki køvast av innantómum nationalum møsni og rakstrarrópum. Vælferðin hjá vanliga manninum var ov álvarsamt mál til at spæla sær við.

Eitt aðaltema var, at at vit aldri kundu líta á, at vit vóru komin á mál. Vit máttu ongantíð gloyma og ansa eftir, at tey ungu ikki gloymdu tað ræðuligu mótstøðu, sum hevði verið beint eftir kríggið. Hann legði fólki eina við, at tað yngra liðið mátti verða javnliga upplýst um, hvussu ræðuliga loysingarmenninir høvdu borið seg at, og hvussu lættliga vit kunnu fáa ta tíðina aftur. **Hann ávaraði inniliga og bað fólkið vera á varðhaldi móti fanatismu!**

Hann helt eisini, at tað var týðuligt, at vit ikki skuldu lata okkum forføra av úlvum í seyðaklæðum., tí sjálvt um loysingarfólk nú bóru seg hampuliga at í gerandisdegnum, og menn høvdu smoygt sær í demokratiskan ham, so skuldi altíð ikki so nógv til, at *hógvarnir* sóust. Teir komu undan viðhvørt, meira enn so. Her hevði hann óivað episoduna við Pouli P. í huga, har hesin bert brúkti sítt talufrælsi sambært danska grundlóg.

Fólk vóru avbera hugtikin av røðuni, reistu seg og fagnaðu bæði røðara og umrøddu við lógvabresti í eina góða løtu. Tað eru enn nógv, sum minnast hesa avgjørt størstu politisku røðu Hans Jákups. P. M. Dam segði aftaná, at seint kom tann dagur, tá ið bara ein *einasti* loysingarmaður vildi verið førur fyri at málborið seg bara hálvt so væl á føroyskari tungu!

### Vent í holuni

Sum ellisárini nærkast, hoknar Heðin Brú av týðing og arbeiði vid tveimum arkaiskum bókum um ta *fjaru* fortíðina, *Lívið lær* og *Tað stóra takið.* Hesar bøkur eru beint út flýggjan frá tí *nærliggjandi kontroversiellu* fortíðini og samtíðini við, men Heðin Brú er so listin lærdur, at hann fær ikki sørt av nútíðarkritikki inn í hesar bøkur eisini. Ein typa sum Hanusar-Óli úr *Lívið lær* er sum tikin mitt úr fullveldisliðinum. Lívsáskoðanin hjá Hanusar-Òla er heilt fesk og kynisk fullveldisáskoðan. Figururin Durita er harafturímóti ein hent og hugnalig *stereotypa,* sum man kundi møtt hjá Charles Dickens.

Eftir at Hans Jákup er deyður, kom gongd á myturnar, og tað freka fullveldisliðið fer at royna at gera hann til teirra mann. (Smb. grein hjá rúgvuskaldinum Jens Paula Heinesen í fjør heyst). Ansa vit ikki væl eftir, so fer hesin nationali kavabólturin á rull. Men eg kann vissa menn um, at var tað nakað Hans Jákup í Stovuni *ongantíð* var, so var tað loysingarmaður!

Tvørturímóti. Hann var ideologiskur ríkisfelagsskapsmaður. Tað hildu hann og hansara menn vera tað tryggasta støði fyri okkara tjóðskapi So paradoksalur kann veruleikin vera! Hesir menn vistu, at tilveran er kompleks og langt frá so einføld og vulger sum í fullveldisfilosofiini.

Ótaldar eru tær løtur, táið Petur Mohr Dam,

*Framhald á s. 16*